# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/10 - 10. november 2022 16:00-18:00

### Skrá:

1. Foreldraumboðsfundurin
2. Vetrarferia
3. Felags foreldrafundur
   a) Kostur og svøvnur lýst frá ymiskum sjónarhornum
   b) At vera eitt gott fólk og virða hvønn annan - empati, dannilsi og mørk
   c) Førleikabýti - Lærarar at greiða frá um tað og fyrimunir og vansar
   d) Skúlaskapur - Hvussu stóran týdning hevur hugburðurin hjá foreldrunum mótvegis skúlanum á skúlagongdina og trivnaðin
4. Ymiskt
5. Áseta næsta fund: Uppskot: 19 januar 2023

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Snorri, Erla, Sjúrður & Derhard |
| Forfall: | Bjørg, Ruth |
| Gestir: | eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**Foreldraumboðsráðsfundurin**
Hetta er aðru ferð vit hava foreldraumboðráðsfund. 43 foreldur møttu. Hetta er góð uppmøting.
Byrjað varð at viðgera vetrarfrí. 29 vóru fyri og 14 vóru í móti millum foreldrini.
Í starvsfólkahópini var helvtin fyri og helvtin ímóti.
Síðan hevur hetta eisini verið viðgjørt í frítíðarskúlanum. Haðani er eingin møguleiki at broyta hetta.
Niðurstøðan er at skúlastýrið ger ikki meira við málið og harvið verður eingin vetrarfrítíð.

Foreldur spyrja eftir fundarfrágreiðingum frá skúlastýrinum. Hesi skulu leggjast út á saf.fo. Skúlastýrið heitir á leiðsluna ella kt-toymið um at fáa hetta í lag.

Orðið er frítt undir ymiskum til umboðsfundin, og tá kunnu tónin og evnini gerast neilig. Hetta vilja foreldraumboðini tosa um sínamillum og kanska tillaga hetta til næstu ferð, so evnið ymiskt verður bæði rós og rís.

Stýrið velur at halda fast við at hava umboðsráðsfundin og kunnar um fundin í góðari tíð við greiðari fundarskrá.

Foreldraráðsumboðsfundurin heitir á skúlan um at bera so í bandi, at starvsfólk ikki seta bilarnar í avsetingarbreytina áðrenn tíðarásetingina. Leiðslan ber boðini út.

Inniskógvar eiga at hava sítt fasta pláss. Kunnu hillar merkjast í gongini ella í stovunum til inniskógvarnar.

Kann náttúran og gongutúrar í størri mun nýtast sum partur av lærugreinini í ítrótti spyrja foreldur um.
Skúlastjórin svarar at hetta kann í avmarkaðan mun vera tikið upp í lærugreinina hat tað passar inn í mun til námsætlanina.

Ad.2.
**Vetrarferia**
Frítíðarskúlin vil ikki vera við. Tískil kann hetta ikki setast í verk. Sí eisini punkt 1.

Ad.3.
**Felags foreldrafundur**

a) Kostur og svøvnur lýst frá ymiskum sjónarhornum
b) Tað góða menniskja - empati, dannilsi og mørk
c) Førleikabýti - Lærarar at greiða frá um tað og fyrimunir og vansar
d) Skúlaskapur - Hvussu stóran týdning hevur hugburðurin hjá foreldrunum mótvegis skúlanum á skúlagongdina og trivnaðin

Foreldraumboðini hava savnað hugskotini undir 4 ymiskar bólkar. Tey eru nevnd omanfyri.
Kjakast verður um hvørja av yvirskriftunum vit skulu arbeiða víðari við.
Stýrið velur evni A. Regin lýsið evnið við støði í b og d tó við a sum yvirskrift samstundis sum okkurt umboð fyri fólkaheilsuráðið leggur fram punkt a sum høvuðspunkt .
Derhard kontaktar Fólkaheilsuráðið. Regin ger ein skrokk til upplegg.

Ad. 4.
**Ymiskt**
4.1
*Góða skúlastýrisumboð,*
*seinastu tíðina hava nógv starvsfólk staðið spyrjandi, og følt seg ótrygg næminganna vegna av hesum marghàttliga og óneyðuga inntrivi av ávísum felagsskapi.*
*Eingin kunning um virksemi ella um freist er løgd út.*
*Haðani koma tí tríggir fyrispurningar, sum ynskjast greiddir, so øll vita hvat skúlin stendur fyri:*
*1.*
*í fyrsta lagi um hvørjir felagsskapir (politiskir/átrúnaðarligir/kommersiellir, ella aðrir) sleppa at føra sítt virksemi á skúlans øki.*
*2.*
*Í øðrum lagi kundi verið gott at vita hvussu hesir felagsskapir fáa/taka møguleikan, og um eftirlit er við hvat virksemið tá er og hvussu leingi tað skal vera.*
*3.*
*Í triðja lagi hevði kunning verið góð at fingið á kunningarportalunum hvørjir felagsskapir hava fingið loyvi og hvussu leingi, so tað er transparent fyri starvsfólk skúlans hvat virksemi fyriferst.*

*Fyriliggja goymdar dagsskráir hjá summum at fáa felagsskapir inn at rekrutera ókritiskar næmingar til sína søk hevði verið ynskiligt at tikið hetta upp til kjak á námsfrøðiligum fundi, ella at leiðslan tók støðu um tað eigur at verða so.*

*Blíðar heilsanir*

*Starvsfólk*

Skúlastýrið hevur viðgjørt spurningin og velur at seta hetta sum sjálvstøðugt høvuðspunkt til næsta skúlastýrisfund. Tá er endamálið at viðgera atgongd hjá felagsskapum til skúlan og fortreitirnar fyri hesi atgongd.
Samstundis heitir skúlastýrið á leiðsluna um at eftimeta ítøkiliga tiltakið, kunna munandi betur um tað.
Skúlastýrið ynskir, at ongar nýggjar avtalur verða gjørdar, áðrenn leiðreglurnar eru gjørdar.
https://paismovement.com/wp-content/uploads/2019/05/Charter-of-Conduct.pdf
4.2
Foreldaumboðini ynskja at fáa útiundirvísing á skrá til skúlastýrisfund.
Foreldraumboðini ynskja at fáa matvirðini á skrá og at skúlastýrið tekur støðu til at matpakkin.fo er beinleiðis leiknkjaður frá saf.fo

Ad. 5.
**Áseta næsta fund**
19 januar 2023 16:00 á Fløtum

Vegna skúlastýrið

Regin Marnersson 10/11-2022